RÁS

...títt radio



## Ársins songrødd syngur

16 ára gamla Birita Poulsen er Ársins Songrødd 2009. Unga kvinnan úr Vestmanna hevur rættiliga hugtikið við sínari frálíku rødd, og hon fer at framføra í Hvonn Live hesaferð.



## Elis fær føroyingar at dansa

Hann fær fólk í øllum aldri kring alt landið at dansa saman við sær fríggjakvøld eftir fríggjakvøld. Elis Poulsen er ímyndin av norðurlendska dansibandstónleikinum, og hann er altíð til reiðar til eitt gott prát við lurtarar kring landið. Men hvat er so serligt við dansi og við norðurlendskum dansitónleiki, og hvat hevur fingið Elis at verða so áhaldandi sum útvarpsvert.



## Vísusangarar spæla

Vísusangararnir Hanus G. Johansen og Jógvan Andrias Joensen hava hvør í sínum lagi givið tónleik út og havt framførslur, men teir hava eisini samstarvað á ymsum økjum í nógv ár. Í Hvonn Live fara teir at hava framførslu saman. Teir spæla sangir, sum teir hava skrivað.



## Krimihøvundin vildi vera fótbóltsspælari

Norðmaðurin Jo Nesbø er ein av bestu krimi-rithøvundum í Europa í løtuni, og hann hevur fingið virðisløn fyri bestu skaldsøgu í Noregi seinastu tvey árini. Jo Nesbø hevur givið sjey altjóða viðurkendar krimisøgur út, og søgurnar um detektivin Harry Hole eru týddar til 30 mál. Tosað verður við Jo Nesbø um at skriva spenningssøgur til altjóða marknaðin, um stóra ungdómsdreymin at spæla fótbólt í Onglandi, og um hvussu hernaðartænasta í Norðurnoregi lærdi hann sjálvdisiplin.

## Heri í Rom og Barbara í paradís

Hvonn Live hevur reportara í Rom og í Keypmannahavn. Vit frætta frá Hera Simonsen, sum er staddur í Rom, har finalan í heimsins størstu fótbóltskapping í ár verður spæld, og frá Barbaru Holm, sum er til finaluna í donsku sjónvarpsrøðini Paradise Hotel.skrivað.

